## Demokratia økisfund í Øravík

Í kvøld klokkan 19 hevur Demokratia økisfund í Øravík. Skráin er henda : Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í Demokratia hugleiðir um, hvussu vit fáa økta kvinnuumboðan í politikki. Ingeborg Winther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, greiðir frá sínum royndum í politikki. Hon er fyrsta kvinnan vald á ting fyri Suðuroynna. Marjun Olsen, býráðslimur á Tvøroyri, og Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, greiða frá royndum teirra í lokalpolitikki.



## EIK á Tvøroyri umvælast

Deildin hjá EIK á Tvøroyri verður í løtuni umvæld, soleiðis at deildin verður meiri kundavinarlig, og kundarnir koma at føla seg væl, tá teir koma inn á deildina til eitt heildarprát. Tað skrivar Suðurrás. Deildin fær eitt nýtt fundarhøli, avgreiðslan verður broytt, og ráðgevararnir fáa betri arbeiðsumstøður. Í sambandi við umbyggingina verður deildin stongd í morgin 16. november, og hon letur upp aftur mánadagin í broyttum sniði.




*Torstein Hansen skilir ikki umrøðuna, sum túrurin hjá Norrönu hevur fingið. Í hansara verð eigur skipari og manning stórt rós uppiborið fyri at handfara støðuna fyrimyndarliga*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stórt rós til skiparan

**- Tað er skakandi at síggja tíðindaflutningin í sambandi við óhappið umborð á Norrönu í vikuni. Støðan var á ongan hátt so dramatisk, sum hon verður gjørd til, sigur norskur ferðamaður, ið var við skipinum hendan túrin**

NORRÖNA

*Leo Poulsen*

*leo@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið gjørt burtur úr hendingini sunnukvøldið, tá Norröna fekk partvísan motorsteðg á veg úr Bergen til Føroya. Serliga summir av fjølmiðlunum hava fingið tað at ljóða, sum var skipið um at ganga burtur. Men hesari tulking eru langt frá øll samd í. Serliga ikki tey av ferðafólkunum, ið Sosialurin hevur tosað við.

Ein teirra, ið var við Norrönu hendan nógv umrødda túrin, er norðmaðurin Torstein Hansen. Hann er komin til Føroya saman við Arve Abelsen í sambandi við samfelagsstevnuna í Ebenezer, sum verður um vikuskiftið.

- Eg var eitt sindur argur um, at fráferðin úr Bergen var nakað seinkað. Men burtursæð frá tí havi eg einki ilt at siga um hvørki ferðina ella handfaringina hjá maningini av støðuni, sigur Torstein Hansen við Sosialin.

Hann er beinleiðis ovfarin av tí, hann hoyrir og sær í bløðum og loftmiðlum um hendan túrin hjá Norrönu, tí hann kennir als ikki støðurnar aftur, sum har verða lýstar.

- Eg merkti á ongan hátt tann dramatikk, sum verður lýstur í fjølmiðlunum. Tað sigur seg sjálvt, at tá tú siglir í 10-12 metra høgum aldum, so má skipið røra seg. Einasta, ið kanska kann setast eitt lítið spurnartekin við, er, um skiparin kundi havt kunnað ferðafólkini betur ta fyrstu løtuna. Men skal veljast ímillum at kunna fólk ella fáa tamarhald á støðuni, so hevði eg í hvussu er valt tað seinna, sigur Torstein Hansen.

### Fyrimyndarligt

Eftir at skiparin hevði fingið tamarhald á støðuni og motorarnir aftur koyrdu, heldur norðmaðurin, at kunningin var fult nøktandi.

Hann er beinleiðis imponeraður av skipara og yvirmonnum og leggur stóran dent á, at øll manningin var ótrúliga hjálpsom.

- Eisini eftir, at vit vóru komin til Hetlands stóð manningin næstan á høvdinum fyri okkum. Vit vóru nakrir norðmenn við hendan túrin, og eingin okkara hevði pass við. Tá eg nevndi hetta í informatiónini syrgdu tey fyri, at vit kortini sluppu í land, og tað haldi eg var ógvuliga væl klárað, sigur Torstein Hansen.

Hann vendi sær sjálvur til Sosialin at siga frá, hvussu hann upplivdi hendan túrin, júst tí hann metir, at alt er yvirdramatiserað.

- Eftir míni metan eigur skiparin stórt rós uppiborið. Sjálvandi er lætt at verða bakklókur, og tað er uttan iva okkurt, ið kundi verið gjørt øðrvísi. Men í mínari verð er eingin ivi um, at bæði skipari og manning handlaðu fyrimyndarliga, og høvdu teir ikki handlað so skilagott, sum teir gjørdu, kundi støðan saktans gjørst álvarslig, sigur hin sera vælnøgdi ferðamaðurin, Torstein Hansen.

- Túrurin var so góður, sum 12 metrar høgar aldur loyva, slær hann fast.




# Kvørnin melur enn

Fyri 10. ferð kemur blaðið hjá Sands Fornminnisfelag, Kvørnin út. Og eins og í undanfarnum útgávum er eisini hesaferð hópurin av áhugaverdum tilfari við.

Sum vant er Ólavur Clementsen ein av høvundunum í blaðnum. Hesaferð um býlingin Norðuri á Bø á Sandi. Hetta er drúgv grein, ið fatar um 14 hús.

Jens Marius Hentze trívur í part av Skopunar søgu, meðan Palli Dalsgaard viðgerð kornarbeiði ði Skálavík. Fróðarmaðurin Hanus A. Samuelsen hugleiðis um heimbygd sína, Húsavík undir heitinum »Húsavík – heima og í huga«, meðan Sjúrður Poulsen skrivar um fugl og fygling í Skúgvi.

Blaðið er fylt við gomlum og forvitnisligum myndum til hvørja grein. Blaðið er ógvuliga rúgvusmikið, heilar 80 síður, og tað kostar tí ikki meiri enn eina krónu fyri síðuna. Tað fæst í øllum vanligum blaðsølum.